# TAÐ HENDIR ...

LAGT TIL RÆTTIS: Eyðun Klakstein




## BRÚKA TÍÐINA RÆTT

Líkamikið hvør tú ert, so er døgnið hjá tær 24 tímar, og tað ræður um at brúka tíðina væl. Í hesi bókini gevur Duncan Bannatyne ráð um, hvussu tú brúka tíðina best – ikki bert tína arbeiðstíð, men eisini tína frítíð.

**DUNCAN BANNATYNE**
How To Be Smart With Your Time



## SVIK

Norski spenningsfilmurin Svik gongur fyri seg miðskeiðis í seinna heimsbardaga. Miðdepilin fyri hendingarnar í filminum er Club Havana í Oslo, har norskar kvinnur, týskir hermenn og onnur hittast.

**SVIK**
dvd-filmur



## NIÐAN Á GÍVRUFJALL

Ein háttur at fáa eitt sindur av motión, frískari luft og uppliving um vikuskiftið kundi verið at farið ein gongutúr í fjøllunum við Hósvík. Sunnudagin verður skipað fyri gongutúri niðan fyri Hamrá og yvir á Gívrufjall. Mælt verður til at hava heit og góð gonguklæði og ein heitan munn við.

**GONGUTÚRUR**
Niðan við Hamrá og yvri á Gívrufjall
Sunnudagin 21/2 kl. 10.00



## HEILSUCÁFE Á SJÚKRAHÚSI

Leygardagin verður serlig heilsurenning í Klaksvík í sambandi við Torradagarnar, tey kalla. Og eftir hesa renning ber til at fara á heilsucafé á Klaksvíkar Sjúkrahúsi. Har kanst tú fáa máta blóðtrýstið, blóðsukrið og gera onkra test. Eisini fara Aksel Johannesen, landsstýrismaður, og Jens Andreassen, lækni, at tosa.

**HEILSUCAFÉ**
Klaksvíkar Sjúkrahús
Leygardagin 20/2 kl. 14.00

## STIMBRA TÍN ÁHUGA FYRI GRØNLANDI



Leygardagin kunnu fólk, sum hava áhuga fyri Grønlandi, hittast til prát og annað. Føroyingar við áhuga fyri Grønlandi fyrr og nú og Grønlendingafelagið hava tikið stig til tiltakið, sum verður í Missiónshúsinum í Sørvági. Á skránni eru millum annað hugleiðingar um Føroyingarfelagið sum varð stovnað í Nuuk fyrst í sekstiárunum og hvussu samkoman hjá Brøðrunum í Nuuk byrjaði.

**GRØNLENDSKT TILTAK**
Missiónshúsið í Sørvági
Leyagrdagin 20/2 kl. 12.00



## CARRÉ Í FOCUS

Fríggjadagin letur upp framsýning við Philippe Carré. Framsýningin verður í Galerie Focus í Havn. Philippe Carré er føddur í bygdini Mailly-la-Ville í Bourgogne í Fraklandi. Hann er útbúgvin fotografur frá á l'Institut Français de Photographie í Paris og hevur gingið á Grafisk Skole í Århus. Frá tí hann fyrstu ferð hevði myndir við á Ólavsøkuframsýningini í 1982, hevur hann regluliga verið við á bæði Ólavsøku- og Várframsýningunum og havt nógvar stakframsýningar bæði her heima og uttanlands.

**PHILIPPE CARRÉ**
Galleri Focus í Havn
Frá fríggjadegnum 19/2



## STUNDUM – STUNDUM IKKI

Hevur tú hug at flenna eitt sindur um vikuskiftið, kanst tú leita tær í Norðurlandahúsið, har Klaksvíkar Sjónleikarfelag næstu tveir dagarnar spælir skemtileikin »Stundum- stundum ikki«.

**STUNDUM – STUNDUM IKKI**
Norðurlandahúsið
Leygardagin 20/2 og sunnudagin 21/2